# Lærarastørv

## í Fuglafjarðar skúla

Hesi tíðaravmarkaðu størv verða lýst leys til setanar:

Starv 1
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,7) frá 14. august til 19. desember 2006**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Starv 2
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,7) frá 14. august til 6. oktober 2006**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Starv 3
- **1 lærari í tíðaravmarkað starv frá 16. oktober 2006 til umleið 5. mai 2007**
  fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

**Stórur møguleiki er fyri, at sami persónur verður settur í starv 2 og 3**

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Harafturat skulu lærararnir kunna átaka sær hesar tímatalvur:**

***Starv 1:*** **Flokslærari í 4. a, 4. a í náttúru/tøkni, tilevning og føroyskum, 8. abc í lívfrøði og 8. b í kristnikunnleika**

***Starv 2:*** **Floksærari í 9. c, 9. c í føroyskum, 5.6. í tilevning og heimkunnleika. Eisini eru 9 t/v í bókasavnsarbeiði**

***Starv 3*:** **Flokslærari í 4. b, 4. b í støddfrøði, náttutu/tøkni, kristnikunnleika og tilevning, 3. b. í tilevning og 8. 9. 10. fl í handarbeiði**

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestnaður ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi hósdagin 3. august kl. 10.**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 214087. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

### Fuglafjarðar skúli
Postboks 9
FO-530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar skúli hevur komandi skúlaár umleið 335 næmingar í 19 flokkum. Við skúlan fara at starvast 34 lærarar, 1 stuðul, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

## Gjáarlon søkir námsfrøðing, hjálparfólk og tímaløntir avloysarar

Søkt verður eftir námsfrøðingi, hjálparfólkum og tímaløntum avloysarum til dagstovnin Gjáar-lon í Vestmanna at byrja 1. september 2006.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 30 tímar um vikuna at byrja 1. september til serligt arbeiði í avmarkaða tíð, og við møguleika fyri at halda áfram í starvi sum námsfrøðingur. Lønin fylgir lønarskalanum 11 – 18. Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin. Hesi fylgja lønarskalanum 3 – 8.
- 1 hjálparfólk 35 tímar um vikuna at byrja 1. september
- 1 hjálparfólk fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi 20 tímar um vikuna frá 1. september 2006 til 20. mai 2007.
- tímaløntum avloysarum

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.
Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl. 17:15.
Gjáarlon er ein grønur srovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.
Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerðandisdagurin er somuleiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiði. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 230134.

**Umsókn og freist**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 11. august, kl 12:00. Setanarsamrøður verða í viku 33.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

**Gjáarlon**
**Hornavegur 16**
**FO – 350 Vestmanna**
**Umsóknir skulu merkjast "Gjáarlon".**

EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

Eysturskúlin søkir eftir 2 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2006/07.
1 størv vegna avlopstímar.
1 starv, fyribils til 13. november, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Søkt verður eftir lærarum, sum kunnu undirvísa í føroyskum, donskum, kristni, søgu og ítrótti í framhaldsdeildini umframt at undirvísa næmingum við serligum tørvi.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**
- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At styrkja lærugreinatoymini

**Søkt verður eftir lærarum sum:**
- Hava læraraútbúgving
- hava áhuga fyri undirvísing
- Duga væl at samstarva og samskifta
- vilja at menna skúlan
- ikki ræðast nýggjar avbjóðingar

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á tlf. 302540 ella 214752. Eisini ber til at senda teldupost til eys@skulin.fo.

Umsóknir við prógvum, cv og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. august.

### Eysturskúlin
Tórgarðsgøta 17
100 Tórshavn

Í Eysturskúlanum verða komandi ár 564 næmingar í 1. til 10. flokk og uml. 50 lærarar. Innskúling er skipað við sjálvstýrandi toymum og arbeitt verður við at skipa allan skúlan á henda hátt. Vit arbeiða í løtuni við at orða virðisgrundarlag skúlans, menna ársætlanirnar og at innrætta skúlan til eitt kveikjandi lærlingaumhvørvi.

## Starvsfólk

Vegna økt virksemi søkja vit eftir starvsfólki

Vit søkja eftir:
- · Handilslærning (til handil)
- · Lagurmann (til lagur og útkoyring)
- · Snikkara/timburmann e.l. (til uppsetan og samling av køkum)

Løn og arbeiðistíðir eftir avtalu

### Kvik Køkssentrið
Hoyvíksvegur 65 · 100 Tórshavn
tel. 312480 · fax 319718

kvik

Kvik Køkar er ein fyritøka, ið varð stovnað í 1991. Vit selja køkar, baðirúm, klædnaskáp, hvítvørur og tilhoyr. Eisini hava vit eina deild við gávulutum og brúkslist

# Lesið Sosialin - so eru tit við